# Í hernað ímóti dálking í Havn

**– Vit hava sæð skriftina á vegginum. Hetta gongur ikki meiri, sigur Schumann Hjaltalin, býráðslimur og formaður í Heilsu- og umhvørvisnevndini**

DÁLKING
*Áki Bertholdsen*



*– Vit taka dálkingina í allarstørsta álvara og tí taka nú ítøkilig stig fyri at royna at basa henni, ikki bara á Havnarvág, men í býnum sum heild, sigur Schumann Hjaltalin, formaður í Heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar Býráð.*

Nú ætlar Tórshavnar Býráð sær rættiliga í hernað ímóti teirri ógvusligu dálkingini, sum er í Havnini.

Havnin hevur verið serliga illa plágað av dálking seinastu mánaðirnar. Ikki minst hava fólk seinastu vikurnar lagt merki til, at Havnarvág hevur verið illa dálkað av olju og ferð eftir ferð hava bjargingarlið verið noydd til at fara til verka at taka olju upp, sum er likin á sjógv og hevur dálkað vágna.

Men tey, sum ferðast aðrastaðni í býnum, vita, at oljudálking á Havnarvág er ikki einasti umhvørvistrupulleikin í høvuðsstaðnum.

Og nú um dagarnar kravdi Bátafelagið í Havn, at dálkingin varð tikin í álvara ogt at ítøkilig stig vórðu tikin fyri at basa henni.

Og tað verða tað nú.

– Vit taka dálkingina í allarstørsta álvara, sigur Schumann Hjaltalin, formaður í Heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar Býráð.

Hann sigur, at tey hava sæð skriftina á vegginum.

– Eg taki fult undir við Bátafelagnum tí hetta líkist ongum. Og hetta gongur heldur ikki meiri og tí taka vit nú ítøkilig stig fyri at royna at basa dálkingini, ikki bara á Havnarvág, men í býnum sum heild, sigur býráðslimurin.

Hann sigur, at tað er greitt, at umhvørvið er ikki eitt mál, sum hevur verið raðfest nóg ovaliga í býráðnum, tí tað hava verið so nógv onnur, heilt átrokandi mál at loyst, at orka hevur ikki verið til tað eisini.

– Men nú er broyting komin í og umhvørvið skal longur upp á raðfestingarlistan hjá kommununi. Vit noyðast at ganga undir tey krøv, sum borgararnir í Tórshavnar kommunu seta til býráðið á umhvørvisøkinum.

### Umhvørvisdeild og tilbúgving

Schumann Hjaltalin sigur, at fyrsta stigið er at seta á stovn eina umhvørvisdeild í Kommununi

Hann sigur, at Heilsu- og umhvørvisnevndin hevur longu samtykt, at ein umhvørvisdeild skal setast á stovn í kommununi, tað gjørdi hon síðst í juni.

Nú skal málið takast upp í býráðnum í sambandi við, at fíggjarætlanin fyri næsta ár skal leggast.

Sjávur væntar hann, at Býráðið tekur undir við ætlanini og at peningur verður settur av til deildina.

– Hetta verður ein deild, sum burturav skal arbeiða við umhvørvismálum. Hon skal sostatt ikki bara arbeiða ímóti oljudálking, men hon skal arbeiða við umhvørvismálum í breiðastu merking.

Eitt nú hugsar hann sær, at deildin eisini skal arbeiða við ruskinnsavningini og kanska skipa fyri, at ruskið verður skilt, so at ein partur av tí kann endurnýtast.

Fyri 14 døgum síðani, tann 23, august, setti býráðið harumframt ein bólk, sum skal samskipað ruddingararbeiðið, um Havnarvág verður dálkað av olju.

Ì hesum bólki eru brandmeistarin, býarverkfrøðingur, stjórin á brennistøðini og havnarmeistarin og teir skulu nú gera eina tilbúgvingarætlan fyri, hvussu ruddingararbeiðið skal fara fram, um havnarvág verður oljudálkað.

– Somuleiðis eru vit farin at kanna øll arbeiðspláss, sum liggja framvið vágni fyri at vita hvørja tilbúgving tey hava, skuldi eitt óhapp hent sum førdi til, at vágin varð dálkað og fyri at vita, hvussu tey annars eru skipað, tá ið tey fáast við dálkandi evni.

Og at enda skulu kloakkskipanirnar hjá kommununi sjálvari gjøgnumgangast fyri at vita, um nøkur dálking hendur tann vegin.

## Kappast um nýggja studentaskúlan í Suðuroy

SKÚLABYGGING
*Áki Bertholdsen*

Tað gongur alsamt framá við ætlanini at byggja nýggjan studentaskúla í Suðuroynni.

Bygginevndin hevur gjørt at at skipa fyri arkitektakapping um nýggja skúlan og í Sosialinum í gjár varð lýst við projektkapping um miðnámsskúla í Suðuroy.

Endamálið við kappingini er at fáa uppskot um, hvussu skúlin skal síggja út.

Skúlin skal vera tíðarhóskandi karmur um fjølbroytt og framkomin útbúgvingartilboð fyri ung og tilkomin. Men samstundis skal skúlin hava umstøður til at gerast virkin partur av samfelagnum og geva møguleikar fyri at binda saman undirvísing, mentan, arbeiðslív og vinnulív í Suðuroynni.

Talan er um eina almenna kapping, har øll, ið halda seg hava førleika at vera við, kunnu lata uppskot inn.

Bygginevndin hevur 200.000 krónur at lata til virðislønir og til at keypa eitt møguligt uppskot fyri. Men tað er í øllum førum greitt, at uppskotið, sum vinnur kappingina, fær minst 100.000 í fyrstu virðisløn.

# Almennur fundur í Suðuroy um nýggja suðuroyarskipið

**–Hóskvøldið fer Strandferðslan at fortelja almenninginum í Suðuroy um nýggju suðuroyarferjuna, sum skal byggjast ístaðin fyri Smyril**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Hóskvøldið verður almennur fundur í Suðuroy, har Strandferðslan fer at greiða frá nýggja suðuroyarskipinum og at vísa myndir av henni*

Nú fer Strandferðslan at hava kunnandi fund fyri suðuroyingum um nýggju suðuroyarferjuna, sum skal byggjast ístaðin fyri Smyril.

Fundurin er almennur og hann verður á gistingarhúsinum í Øravík hóskvøldið klokkan 19.

Við á fundinum vera umboð fyri Strandferðsluna, umframt umboð fyri danska felagið, Knud E. Hansen, sum hevur projekterað nýggja suðuroyarskipið. Harumframt verða eisini limirnir í projektbólkinum hjá Strandferðsluni, sum hava lagt nýggja skipið til rættis.

Knud E. Hansen læt fyrr í summar Strandferðsluni tað lidnað projektið og fyri einum 14 døgum síðani vórðu Løgting og landsstýrið kunnað um ætlanina.

Nú suðuroyingar skulu kunnast um nýggja skipið, er tað eitt rúgvismikið tilfar, sum Strandferðslan og Knud E. Hansen hava at leggja fram fyri fólki.

Eitt nú fer stjórin á Strandferðsluni, Reidar Nónfjall, at leggja fram um um ferjurakstur í Føroyum og um tær avbjóðingar, sum eru fyri framman.

Aftaná fer umboðið fyri Knud E. Hansen at leggja fram um sjálva ferjuna. Hann fer at greiða frá, hvussu hon sær út, hvussu hon er innrættað o.s.fr.

Samstundis hevur hann serligar teldumyndir av nýggju ferjuni, har tað, sæst, hvussu hon fer at síggja út, júst sum á eini fotomynd.

Aftaná framløguna verður høvið hjá fundarfólkinum, at seta fram viðmerkingar og spurningar til Strandferðsluna og Knud E. Hansen um skipið.

Strandferðslan sigur, at tað er pláss fyri gott 200 fólkum í fundarhølinum á gistingarhúsinum og at tey vóna, at so nógv sum gjørligt fara at møta upp.



# Vinnumálastýrið hevur skift til Kall

**Vinnumálastýrið skifti fyri kortum veitara á samskiftisøkinum. Nýggi veitarin er Kall. Tað er samstundis Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sum umsitur Føroya Tele í landsstýrinum, sum skiftir veitara**

FJARSKIFTI
*Heri á Rógvi*



*Vinnumálastýrið hevur skift til Kall sum veitara av fastnettænastum.*

Fyri einum góðum ári síðani fingu føroyingar kapping á fjarskiftisøkinum. Hetta hendi, tá tvær nýggjar fyritøkur bjóðaðu seg fram sum veitara av telefontænastum.

Síðani tá hava tær báðar nýggju fyritøkurnar, Kall og TeleF, lagt saman til eina nýggja fyritøka, sum eitur eftir einari av fyritøkunum, Kall. Longu frá byrjan søgdu umboð fyri hesar báðar fyritøkur, at tað fór at vera trupult hjá trimum tílíkum fyritøkum at yvirliva, og hetta máttu báðar fyritøkurnar eisini sanna rættiliga skjótt, og úrslitið er nýggja fyritøkan Kall, sum í skrivandi stund eigur umleið 10% av marknaðinum. Havast skal í huga, at Kall í løtuni ikki bjóðar fartelfontænastur.

Ein tann nýggjasti kundin hjá Kalli er Vinnumálastýrið.

### Skift

Arne Poulsen, aðalstjóri í Vinnumálastýrinum, váttar fyri Sosialinum, at Vinnumálastýrið hevur skift til Kall sum veitara av fjarskiftistænastum innan fastnet. Talan er bert um fastnetveitingar, tá aðrir veitarar eru á bæði GSM og Internet tænastum.

Tað var 1. august, at avgerðin varð tikin at skifta veitara til Kall. Hetta varð gjørt eftir at biðið varð um tilboð frá teimum ymsu fyritøkunum. Sambært Hjørdis Gaard, fulltrúa í Vinnumálastýrinum, er hetta vanlig mannagongd, t.e. at bjóða út ymiskar tænastur, tørvur er á.

Freistin varð sett til 1. juni. Eftir hvat Sosialurin skilur, lótu bæði Kall og Føroya Tele tilboð inn.

Tilboðið, Føroya Tele letur inn, bjóðar Vinnumálastýrinum ávísan avsláttur, men hetta hóvar ikki Fjarskiftiseftirlitinum, sum vísir á, at tilboðið hjá Føroya Tele er brot á fjarskiftislógina. Føroya Tele fekk álagt at halda uppat við at geva tílík tilboð. Sostatt kundi Føroya Tele ikki geva nakað tilboð til Vinnumálastýrið, sigur Richard Mortensen, makrnaðarstjóri hjá Føroya Tele.

Endin var, at Kall gjørdist veitari hjá vinnumálastýrinum innan fastnettænastur.

- Vit mettu allar umsóknirnar á jøvnum føti, og koma til ta niðurstøðu, at Kall hevði besta bilboðið, sigur Hjørdis Gaard, fulltrúi í Vinnumálastýrinum.

Hin 25. juli móttekur Vinnumálastýrið eitt skriv frá Kall, har teir seta spurnartekin við frígevingina av fjarskiftismarknaðinum í Føroyum. Ì sami skrivi verður víst á, at Kall tá ikki hevði ein almennan stovn sum kunda, hóast teir hava væl lægri prísir. Hetta skriv varð sent eina góða viku frammundan, at avgerð varð tikin um at skifta til Kall.

Skrivið frá Kalli varð eisini sent frá Vinnumálastýrinum til hini stýrini.

### Avsláttarskipan

Orsøkin til, at Fjarskiftiseftirlitið tók so dýran til í skrivi til Føroya Tele, sum varð sent 12. juni 2001, var, at Føroya Tele onga góðkenda avsláttarskipan hevði. Fjarskiftiseftirlitið gav Føroya Tele eina stutta freist at halda uppat at geva tílík tilboð. Ì sama skrivi stendur eisini at lesa, at Fjarskiftiseftirlitið, um freistin um at halda uppat við at geva tilboð ikki varð hildin, vildi meta um, hvørt málið skuldi meldast til Landfútan sum brot á fjarskiftislógina.

Nýggja stríðið á fjarskiftismarknaðinum í Føroyum snýr seg eisini um hesar góðu avsláttarskipanir. Sum støðan er í løtuni, so hevur Kall eina góðkenda avsláttarskipan, men Føroya Tele enn ikki hevur fingið nakra avsláttarskipan góðkenda, hóast teir hava søkt í eina tíð nú.

Jógvan Thomsen, stjóri á Fjarskiftiseftirlitinum, sigur, at teir hava góðkent eina avsláttarskipan hjá Kalli, men Føroya Tele enn ikki hevur fingið nakra avsláttarskipan góðkenda.

Jógvan vísir á, at teir skulu syrgja fyri, at eitt nú reglugerðinar verða hildnar. Hann vísir eitt nú á, at meginreglarnir fyri prísáseting skulu yvirhaldast.

Føroya Tele hevur havt eina umsókn liggjandi hjá fjarskiftiseftirlitinum, men Sosialurin fekk beint undan evstamark at vita, at henda eisini varð noktað av Fjarskiftiseftirlitinum.

### Tveir leiklutir

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, heldur ikki, at tað er nakað løgið í, at Vinnumálastýrið nýtir Kall sum veitara av fastnettænastum.

Hesi somu áskoðan hava bæði Hjørdis Gaard og Arne Poulsen. Hjørdis Gaard vísir eisini á, at Vinnumálastýrið eisini hevur ein internetveitara, sum ikki eitur Føroya Tele.

Bjarni Djurholm ásannar, at hann í hesum førinum hevur tveir leiklutir: »eigari« av Føroya Tele og ein landsstýrismaður, sum skal syrgja fyri eins fortreytum fyri øll og reka umsitingina so skynsamt sum gjørligt.

Bjarni Djurholm vísir somuleiðis aftur ákærunum um, at hann minkar um virðið hjá Føroya Tele.

- Tað, sum vit missa her við at skifta til Kall, fáa vit aftur aðrastaðni, sigur Bjarni Djurholm.

Andras Róin:

# -Vit mugu hava greiðar spælireglar

**Andras Róin, stjóri hjá Føroya Tele, er alt annað enn nøgdur við viðferðina, ið teir hava fingið frá Fjarskiftiseftirlitinum í sambandi við avsláttarskipaninar. Hann kallar tað m.a. eina skeiv regulering**

FJARSKIFTI
*Heri á Rógvi*



*Andras Róin er sera misnøgdur við viðferðina, sum Føroya Tele hevur fingið frá Fjarskiftiseftirlitinum.*

Andras Róin, stjóri hjá Føroya Tele, er alt annað enn fegin fyri ta viðferð og tær treytir, sum Føroya Tele í dag skal virka undir.

Hann vísir á, at teir síðani í mai mánað hava roynt at fingið eina avsláttarskipan góðkenda, men hetta hevur framvegis ikki givið annað úrslit enn, at teir ferð eftir ferð fáa boð um at koma við fleiri upplýsingum.

Andras Róin heldur tað vera løgið, at tað ikki kann bera til hjá teimum at fáa eina avsláttarskipan góðkenda, tá tað eftir øllum at døma er einki fyri hjá Kalli.

Hesi somu áskoðan hevur Richard Mortensen, marknaðarstjóri hjá Føroya Tele, sum leggur aftur, at talan er um eitt eindømi.

### Skeiv regulera

Ì fjarskiftislógini stendur at lesa, at skipað skal verða soleiðis fyri, at talan kann vera um frælsa kapping. Eftir hvat Sosialurin skilur, so verður serliga tikið hædd fyri hesum, men tulkingin av hesum kann oftani vera eitt fløkt.

Andras Róin sigur seg ikki hava nakað ímóti kapping.

- Eg haldi at kapping er neyðug, og hetta vil eisini gera okkum enn betri, men tað hevur stóran týdning, at kappingin er á jøvnum føti, og sum nú, so er ikki talan um líkastillaðu kapping, sigur Andras Róin.

Andras Róin ásannar samstundis, at Føroya Tele hevur nógvar fyrimunir, ið eitt nú Kall ella aðrir møguligir veitarar ikki hava, men vil eisini broyta seg í framtíðini. Her verður eitt nú hugsað um, at Føroya Tele í løtuni er eisini útbjóðarin av fartelefontænastum, og hetta er í løtuni eisini ein av teirra stóru inntøkum.

- Eg eri ikki nøgdur við støðuna sum hon er. Vit ynskja fyrst og fremst at sleppa at kappast á jøvnum føti við aðrar, og vit sakna veruliga greiðar spælireglar, sigur Andras Róin.

Richard Mortensen vísir á, at við at skifta til Kall, so minkar Bjarni Djurholm um virðið á sínari egnu fyritøku. Richard Mortensen sigur víðari, at við at gera soleiðis, so stiðjar Bjarni Djurholm skeiv reguleringini.

### Privatisering?

Føroya Tele verður sum nú rikin sum einhvør onnur privat fyritøkan. Men tað er framvegis almennir pengar, sum mynda 100 % av partapeninginum.

Nú tá landsstýrismaðurin í vinnumálum er komin í eina tílíka støðu, so ber tað eisini til at seta spurningin, um tað ikki hevði verið rættast at privatisera Føroya Tele.

Andras Róin sigur, at hann vildi fegin havt Føroya Tele at verið eina vanliga privata fyritøku, men hetta er ein politiskur spurningur.

- Sum nú verður Føroya Tele rikið sum ein privat fyritøka, og hevði Føroya Tele verið privatiserað, so hevði hetta ikki merkt tað stóra fyri fyritøkuna hvat viðvíkur raksturin, sigur Andras Róin. Hann sigur eisini, at hann ivast í, um privatir íleggjarar høvdu funnið seg í tílíkari viðferð frá Fjarskiftiseftirlitinum.

Hann sigur, at Føroya Tele hevur nakrar uppgávur, ið fyritøkan bæði nú og í framtíðini hevur skyldu til at røkja.

Føroya Tele hevði eitt yvirskot áljóðandi 20,5 mió fyrra hálvár í ár.